


*Kvinnuráðstevnan í Havn hetta vikuskiftið, hevur verið serstakliga væleydnað, men har fingu at vita um eitt nýtt slag av harðskapi ímóti kvinnum*

Nýggjasta vápnið hjá monnum:

# Elektroniskur harðskapur móti kvinnum

**Menn, sum eru harðligir ímóti kvinnum, fylgja við tíðini og teir hava eisini tikið allar nýggjastu tøknina í brúk, varð upplýst á kvinnuráðstevnu í Havn hetta vikuskiftið**

HARÐSKAPUR ÍMÓTI KVINNUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er onki mark fyri, hvat menn kunnu finna upp á tá ið teir vilja gera seg inn á eina kvinnu.

Og tað nýggjasta slagið av harðskapi ímóti kvinnum er elektroniskur harðskapur.

Tað fingu tey at vita, sum hetta vikusskiftið hava verið á ráðstevnu uppi á Hotel Føroyum um harðskap ímóti kvinnum.

Elin Reinert Planck, sum er ein av fyrireikarunum, sigur, at ráðstevnan hevur verið serstakliga væleydnað við nógvum góðum og áhugaverdum fyrilestrum so fyrireikararnir eru sera væl nøgdir.

- Tað nýggjasta, vit hava fingið at vita, er, at nú hevur eitt higartil ókent slag av harðskapi ímóti tikið seg upp.

- Tað byrjaði í USA, men er so smátt komið hendavegin eisini og í teimum størru Norðurlondunum hava vit longu sæð teir fyrstu spírarnar til hetta slagið av harðskapi.

Og tað er elektroniskur harðskapur!

- Í Føroyum hava vit ikki sæð dømi um tað enn, men tá ið tað er komið, er tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn tað kemur hendavegin eisini og tí ræðir um at verða fyrireikað og vita eitt sindur um, hvussu ein kann verja seg fyri slíkum, sigur Elin Reinert Planck.

Tá ið hugsað verður um elektroniskan harðskap,verður ikki hugsað um at senda ófantalig sms ella teldubrøv.

Tað er nógv meiri enn tað!

- Tað snýr seg um, at nú á døgum er tað ógvuliga lætt at avlurta fartelefonir og telefonir til fastnet, eitt nú tráðleysar telefonir fyri at hava eftirlit, hvønn kvinnan tosar við og um, hvat.

- Tað nýggjasta er eisini at bróta seg inn á telduna hjá konuna fyri at lesa alt samskifti, hin hevur við onnur.

Men tað mest óhugnaliga er, at nú á døgum ber tað til at brúka alheims fylgissveinaskipanina, GPS, til at fylgja nágreiniliga við, hvar kvinnan ferðast.

- Tað ber til at keypa eitt lítið tól og hefta tað upp á bilin hjá kvinnuni, ella á fartelefonina ella okkurt viðføri hjá kvinnuni, ella upp á børnini og so fylgja heilt neyvt við, akkurát, hvar kvinnan ferðast.

Elin Reinert Planck sigur, at hetta slagið av harðskapi er blivið heilt vanligt í USA, men tað er nokk bara ein spurningur um tíð, áðrenn tað so kemur henda vegin.

- Hetta er eitt nýtt slag av yvirgangi ímóti kvinnum, sum hevur stungið seg upp og avbjóðingin verður nú at finna hættir at verja seg fyri hesum.

- Tað mest avgerandi er, at kvinnan er greið yvir hendan møguleikan og roynir at verja seg sum frægast.

- Ein máti er sjálvandi, at er talan um samrøður, sum maðurin ikki skal vita av - eitt nú vissi kvinnan leitar sær hjálp á eini kreppumiðstøð - er tað klókast at brúka onkra heilt aðra telefon enn sína egnu, ella tað, sum er í húsunum, sigur Elin Reinert Planck.

**SKEMMAN** | søkir handilslærling



**Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar góðar fyrimunir**

**Vit bjóða:**
· Møguleika fyri altjóða útbúgving
· Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
· Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
· Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
Samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi, arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Kanada, Letlandi, Litava og Estlandi. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 20 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 1000 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 7 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark. Gjøgnum samstarvið við Jysk fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jútlandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanliga handilsútbúgving. Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

Lærlingurin skal byrja 1. oktober.

Hevur hetta tín áhuga, send so eina skrivliga umsókn innan 1. september til:

**SKEMMAN**
Staravegur 7 · Postboks 3278 · 110 Tórshavn

ella á teldupost: skemman@skemman.fo

Meira fæst at vita um læruplássið við at ringja 315588 og spyrja eftir Dan.

Staravegur 7 · Tórshavn
Tel 315588 · Fax 310709
**SKEMMAN**

petur & petur • 320870